Neistin-VÍF 20-30 (11-16)

# VÍF skúmandi til finaluna

**Um tað var sjampanjuhondbíoltur ella bara cola-brús skal ikki verða gitt um, men VÍF setti Neistan so ruddiliga upp á pláss í seinnu hálvfinaluni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hondbóltsfepurin er ivaleyst væl oman fyri tey 37 stigum í Vestmanna fyri tíðina. Bæði kvinnur og menn hava kappingarárið á tamb verið í oddinum í landskappingini, og mikukvøldið gjørdist greitt, at nú verða bæði liðini umboðað annan leygardag, tá finalan í Coca-Cola kappingini skal spælast.

### Løgdu hart út

Undan dystinum høvdu neistakvinnurnar helst vóna, at tað skuldi bera til at skala VÍF, og harvið tryggja sær onkran málm í einum kappingarári, sum slt meira líkist fyrsta málmleysa árinum í eitt mannaminni hjá teimum bláu.

Fyrru hálvfinaluna vann VÍF við fýra málum, men Neistin hevði í longum løtum væl fatur á teimum í tí dystinum, og fyrstu løtuna av dystinum mikukvøldinum var eisini líkt til, at Neistin ætlaði sær at vinna hesi fýra mál innaftur.

Leikferðina royndu tær at seta so høgt upp sum gjørligt. Møguliga í eini roynd at kvala VÍF, sum ikki hevur so breiðan bonk, og tískil ikki fær skift so nógv út undir dystinum. Fyrstu løtuna sá eisini út til, at hetta undir øllum umstøðum fór at borga fyri einum spennandi dysti, har liðini skiftust um at skjóta mál, í royndini at skapa sær sjálvum ein avgerandi fyrimun.

### Sóleyð stýrdi tí mesta

Tað gjørdist tó hampuliga tíðliga greitt, at tað vóru tær úr VÍF, sum betri vóru førar fyri at spæla hendan ferðmikla hondbóltin, sum neistaliðið legði upp til.

Tað var sjónligt, at orkunýtslan hjá neistaliðnum var heldur størri enn hjá gestunum. Rennibanarnir vóru ikki eins skipaðir, og bóltførleikin tóktist heldur ikki at verið eins góður, og um hálvan hálvleikin fór hetta eisini at síggjast aftur á máltalvuni.

Ein av fremstu orsøkunum til hetta tóktist vera, at VÍF nú aftur hevur Sóleyð Mikkelsen á liðnum. Hon hevur drigist við skaða í knænum seinastu tíðina, og hóast hon at kalla bert tók lut í álopspartinum, so var sjónligt, hvussu stóran týdning hon hevur fyri spælið hjá VÍF. Sum spælskipari megnaði hon ferð eftir ferð at leggja neistaverjuna undir trýst, og tá møguleikin beyðst, gjørdi hon sjálv bart, og úrslitið varð hitt sama. Enn eitt mál til tær gulu.

### Orkan var uppi

Vónin hjá neistaliðnum mundi longu verið farin, tá liðini bæði komu á vøllin í seinna hálvleiki. Fimm mál vóru tá á muni, og saman við teimum fýra frá fyrra dystinum, tóktist hetta meira enn møtumikið at vinna innaftur.

Tað gjørdist eisini alt meira greitt, sum dysturin leið, at ógvusliga byrjanin hevði kostað teimum nógvar kreftir, og serliga seinasta korterið kom styrkismunurin til sjóndar.

Ikki tí at VÍF setti so nógv meira á nú. Tær spældu framvegis sítt spæl. Lótu væl vandu systemini koyra í álopspartinum, og høvdu gott tak í verjuni, har serliga miðverjan stóð stinn allan dystin. Munurin kom fyrst og fremst av, at orkan hjá neistakvinnunum nú var um at vera uppi. Teknisku mistøkini gjørdust fleiri í tali, og tí vórðu fleiri bóltar tveittir óneyðugt burtur. Í verjupartinum høvdu tær ikki longur neyðuga yvirskotið til at bróta rennibanarnar hjá mótstøðuni, og tí sá álopsspæli hjá VÍF alt meira ómaksleyst út.



*Høga leikferðin í byrjanini av dystinum kostaði nógv hjá Neistanum. M.a. tí VÍF hevði gott tak á verjupartinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### VÍF eru favorittar

Tá dysturin var lokin, var als eingin ivi um, at betra liðið hevði vunnið, og soleiðis sum VÍF spælir í løtuni, er ilt at síggja, hvør skal kunna forða teimum í at vinna finaludystin.

Stjørnan og VB skulu stríðast um hetta í vikuskiftinum, men líka mikið hvør av hesum sleppur í finaluna, so fer VÍF at verða mett sum favorittur at vinna. Í landskappingini hava tær enn ikki roynt smakkin av einum tapi, og í roynd og veru gerst sannlíki fyri einum slíkum minni, so hvørt sum vikurnar líða.

So hvørt sum blandaði flokkurin av leikarum hevur lært hvønn annan betri at kenna, eru avrikini á vøllin styrknaði alsamt. Ioana Rápa tykist endiliga at vera komin heilt fyri seg eftir álvarsliga skaðan í fjør, Nicoleta Radu gerst betri, sterkari og frekari fyri hvønn dyst, Manuela Stan í málinum man geva mótstøðuliðum marruna av útkøstum sínum, og Sóleyð Mikkelsen man í løtuni vera besti miðspælarin í landinum. Randi og Alis berjast um hvønn bólt á strikuni, og ikki minst hava tær heimligu vestmannagenturnar eisini ment seg nógv í árinum. Nicolina er í løtuni úti við skaða, men bæði Fríða og Jacklin áttu hesa ferð stóran lut í sigrinum.

Trupulleikin hjá VÍF kann verða, at hópurin tykist vera ógvuliga smalur og tískil viðbrekin, men slappa tær nøkunlunda heilskapaðar undan skaðum, fara tær uttan stórvegis fjas av stað við FM-gullinum, og í finaludystinum um góða viku verða tær í øllum førum favorittar.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Neistin: Annika Thomsen 6(3), Katrin á Neystabø 5, Birita Wardum 4, Bjørg Patursson 2, Mildrid Jacobsen 2, Súna Mørk 1
VÍF: Ioana Rapa 9(2), Fríð Marjunardóttir 5, Nicoleta Radu 5, Jacklin Durhuus 5m Sóleyð Mikkelsen 3(2), Randi Kúrberg 2, Alis Høghamar 1
Brotskøst: Neistin 3, VÍF 3
Útvísingar: Neistin 3, VÍF 1
Dómarar úr H71/Kyndli: Petur S. Dahl og Ragnar Simonsen. Tóktist onkuntíð heldur ivingarsamir, men sluppu sum heild hampuliga væl frá uppgávuni.

# Tríggir vóru við fyri 10 árum síðani

**Mørkøre brøðurnir og Jens Martin vóru við, tá Føroyar í 1991 taptu 2-1 móti svenska U-21 landsliðnum**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Í sambandi við landsdystin mikukvøldið hevur tað aftur og aftur verið at hoyrt, at Føroyar og Svøríki onga ntíð áður hava spælt fótbóltslandsdyst ímóti hvørjum øðrum.Tá talan er um altjóða skrásettar a–landsdystir, so er hetta rætt, men tað er ivaleyst upp á sítt pláss at nevna, at føroyingar og sviar ofta hava spælt U–16 landsdystir ímóti hvørjum øðrum, og at talan eina ferð so at siga næstan var um a–landsdyst.

Tað var 11. juni í 1991, at eitt svenskt landslið og Føroyar spældu í Gundadali. Tá varð tað undirstrikað, at talan var ikki um a–landsdyst, tí tað svenska liðið var eitt sokallað olympiskt landslið.

Sviar vunnu 2–1. Føroyska málið skoraði Jan Allan Müller í 1. hálvleiki. Støðan í steðginum var 1–1. Dómari ta ferðina var Kurt Sørensen úr Danmark, og Nemus N. Djurhuus og Jóan Carl Dam vóru linjuverjar, sum tað tá kallaðist (nú rópast teir linjudómarar).

Av teimum átjan spælarunum, sum mikukvøldið umboðaðu Føroyar í Växjö, vóru tríggir við fyri knapt tíggju árum síðani. Teir vóru brøðurnir Kurt og Allan Mørkøre og so Jens Martin Knudsen.

Føroyska liðið 11. juni í 1991 sá soleiðis út: Jens Martin Knudsen, NSÍ – Allan Mørkøre, KÍ, Kurt Mørkøre, KÍ, Jóannes Jakobsen, liðformaður, VB, Mikkjal Danielsen, MB, Albert Ari Thomassen, SÍF – Jan Allan Müller, VB, Abraham Hansen, ÍF, Torkil Nielsen, SÍF, Jens Erik Rasmussen, MB – Gunnar Mohr, HB.

Eftir steðgin kom Rúni Nolsøe, VB, inn fyri Torkil Nielsen, Magni Jarnskor, GÍ, kom inn fyri Jens Erik Rasmussen, og Jens Kristian Hansen, B36, kom á vøllin fyri Gunnar Mohr.

Í 1991 var Páll Guðlaugsson venjari hjá føroyska liðnum.




Almenn móttøka
á Fróðskaparsetri Føroya

Í sambandi við, at Setursskrivstovan er flutt, og at Altjóða Skrivstovan er latin upp, verður

ALMENN MÓTTØKA

fríggjadagin 2. februar 2001 kl. 14.00–17.00
í nýggju hølunum í Savnshúsunum,
J. C. Svabos gøtu 14 (gróthúsið á Debesartrøð).

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J. C. Svabos gøtu 14
100 Tórshavn





www.bilar.fo





Fáast í tínum klædnahandli
DA FA Tel. 319591





Knæsokkar fra DIM
Tann breiði elastikkanturin forðar fyri merkjum á beinunum og ger at sokkurin passar perfekt
Fáast í tínum klædnahandli
DA FA Tel. 319591


www.sosialurin.fo

## HEILSANIR



**Góðu mamma og babba**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum.
**Ynskja børnini**


KLAKSVÍKAR DAMPVASKARÍ



Umframt vasking av vanligum klæðum hava tygum nú møguleika fyri at fáa klæði tygara kemisk reinsað í okkara nýmótans reinsimaskinu.

Til dømis reinsa vit:
klædningar, buksur og jakkar,
dýnujakkar, termodraktir
(og onnur oljudálkað pløgg)

Tygum kunnu lata toy inn á hesum støðum:
Í Havn: »Seytjan« á Áarvegnum
Í Eysturoy: »Josi« á Skála, »Jungmann« í Runavík, »Rokoko« í Gøtu.

KLAKSVÍKAR DAMPVASKARÍ
Tlf. 455160 · 700 Klaksvík


Heilsanir — 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: .......................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«


Ford Sierra Cosworth
árgang 1992

Til sølu um hóskandi boð fæst.

Tlf. 223 380, 373 680, 373 660



Fartelefon 214865



**Grannskoðaravirkið**
**Højmose, FRR**
v/ Børge Christiansen, cand. merc. aud.
Skrásettur grannskoðari
í Heiðum • 370 Miðvágur
Tlf. 333498 • telefax 333490
E-mail: hoejmose@post.olivant.fo
http.//www.rev-hoejmose.dk

**Bogholder/revisor-assistent – deltid**

Jeg har brug for en erfaren bogholder til at hjælpe med at bogføre hos en klient i Tórshavn 1-2 timer om ugen. Det kan godt foregå om aftenen. Arbejdet kan eventuelt senere omfatte flere klienter i Tórshavn.